VIÐMERKINGAR

# Eg eri ljós heimsins

**Jákup Vang**



Eitt tabuevni, sum hevur verið svárt at skriva um, tí vit hava verið bangin, er tann sálarliga sjúkan. Tann, sum fyri størsta partin er litin upp í hendurnar á psykiatarum og psykologum.

Um vit skulu varpa ljós á hesa sjúku, og tað skulu vit, fyri yvirhøvur at kunna geva veruliga hjálp, so mugu vit fara í Bíbliuna, sum er sannleikin frá Gudi.

Um vit spyrja, hvat sigur Bíblian um hesa sjúku, so stendur ferð eftir ferð, at Jesus rak út illar andar, »demonar«. Tað er nakað, sum er tabu í okkara umhvørvi, í okkara sokallaða framkomna vesturheimi. Vit heilt einfalt ræðast at tosa um tað.

Hetta tabuevni er so heitt, at ein av okkara stóru prædikumonnum avsannaði, at nakar psykiatriskur sjúklingur kundi vera plágaður av illum andum. Eg sigi hann ikki ringan fyri tað. Vit eru ikki upplærd í okkara umhvøri at takla slíkt.

Men Bíblian sigur, at Gud ynskir at kasta ljós inn í hesa myrku verð, at seta fangar í frælsi, leiða teir út í ljósið. Skrivað stendur, at menniskjuni verða plágað av djevlinum og hansara einglum, illum andum, »demonum«.

Men – Jesus er komin at kasta Satan út við øllum hansara sjúkdómsandum. Hann, Jesus, sigraði á Krossinum á øllum Satans veldi. Um vit ikki síggja hetta í eyguni, men stinga høvdið í sandin, so er als ongin hjálp at fáa.

Um psykiatarar veruliga ynskja at hjálpa sálarsjúklingum, so mugu teir eyðmýkja seg og ákalla Gud um hjálp. Og – tað krevur, at teir sjálvir taka við trúgv á Jesus Kristus. Tí – hvussu kann ein blindur leiða blindan?

Tað er einki at øast við, at eg sigi, at tey psykiskt sjúku eru plágað av illum andum. Bíblian sigur, at vit øll verða plágað av djevlinum og hansara »demonum«. Og – tað er einans við hjálp frá Jesusi, vit vinna sigur.

Skrivað stendur: Standið djevlinum ímót, fast í trúnni, so skal hann víkja frá tykkum.

Víðari, í Opb. bókini kap. 2 v. 11.: Teir hava sigrað hann (Satan) við blóði lambsins og við orð vitnisburðar síns. Teir elskaðu ikki lív sítt – líka til deyðan.

Tað dugir ikki at fylla sjúklingar við øllum handan slag av kemiskum medikamentum, at doyva tey niður, og taka frá teimum teirra fría vilja. Ikki tí, eg trúgvi at sumt medisin er gott og at sjúklingarnir tørva tað. Men nógv, sum verður nýtt, er ikki av tí góða.

Psykiatarar brúka nógv narkotisk líknandi evnir, sum eru beint fram »demonframkallandi«. Ætla teir at samskiva við djevulin um menniskja sálir, so fara teir rættiliga skeivir. Tí Satan er bara komin fyri at ræna, oyða og drepa. Hann er faðir lygnanna. Jesus er komin fyri at vit skulu liva og hava lív í yvirflóð.

# Ikki træta, Poul

**Bjarni Djurholm**



Nú Poul Michelsen aftur var í blekkhúsinum um Postverkið, er samanumtikið lítil munur millum sjónarmið og lógaruppskotið. Tí er ilt at skilja allan larmin. Fólkaflokkurin boðar eisini landsstýrinum frá 11. februar, at flokkurin tekur undir við umleggingini. Havi fyri ordans skyld kannað, hvat PM hevur sent til løgmansskrivstovuna, men har vita tey einki um nakað bræv.

Tað vera sjálvsagt nógvar viðmerkingar og uppskot til broytingar í løgtinginum um postverkið, sum samgongunnar og ikki minst fólkafloksins umboð í Vinnunevndini fara at greiða - ikki minst vinnurekandi at gagni. Har er PM ikki limur, men fyri tað verður uppskotið í góðum hondum.

Farnu 6 árini hevur fólkaflokkurin stríðst fyri fyri at fáa einskiljingar á lunn. Hetta eydnaðist ikki. Nú er vend komin í. Saman við javnaðar- og sambandsflokkinum fer fólkaflokkurin í næstum at leggja fram einskiljingarskrá, sum verður søgulig. So - fat mod Daniel (Poul).

Fólkaflokkurin hevur verið eyðkendur av sátt og semju tað undirritaði minnist. Hvat varamaðurin annars heldur um undirritaða kunnu onnur meta um. Bara spell, um ónollurnar og persónliga brikslið, sum hevur eyðkent tjóðveldið, fara at smitta fólkaflokkin.

Tí eru míni ráð til varamannin, vend kanónunum úteftir og ikki inn í flokkin. Hetta er so seinasta viðmerkingin á hesum sinni.

## Poula Lervig heldur grækarismessurøðu í Århus

GRÆKARISMESSA

Leygardagin 12. mars kl 15 skipar Føroyingafelagið í Århus fyri grækarismessuhaldi í hølum felagsins, Áarstovu. Áarstova liggur í Vestergade 48 D.

Á skránni er felagssangur, køkur og kaffi. Poula Lervig ber fram røðu.

Øll - ung sum gomul - stór sum smá - eru vælkomin, siga tey úr Føroyingafelagnum í Århus..

Meira er at finna um Føroyingafelagið í Århus á heimasíðu felagsins: www.aarstova.dk

# SPAM

**Brúkarasamrakið**




*Tað er ringt at meta um, hvussu nógv av samlaða teldupostssamskiftinum er SPAM, men at siga, at tað er umleið helvtin, er ikki so langt av leið. Og tað økist skjótt, sigur Brúkarasamtakið*

Nakað, ið øll fáa, men eingin vil hava. Soleiðis er tað eisini við hesi krúddaðu skinkuni, ið síðani annan heimsbardaga nógvastaðni hevur verðið nýttur sum hernaðarmatur. Serliga kent gjørdist navnið tá Monty Python gjørdi ein lítlan leik um evnið. Í dag verður SPAM vanliga eisini brúkt um óumbiðnar teldupostar.

At senda slíkar postar er farið at vinda alsamt meira uppá seg. Hjá summum kunnu teir koma í so stórum tali, at teldupostadressan gert ónýtilig. Serliga óheppi er tað, um alt ov ung fólk fáa sendandi óhóskandi tilboð.

Tað er ringt at meta um, hvussu nógv av samlaða teldupostssamskiftinum er SPAM, men at siga, at tað er umleið helvtin, er ikki so langt av leið. Og tað økist skjótt. Hvussu ber tað so til, at onkur tímur at sita og senda hesar postar í hópatali. Tað er tað ikki so ringt at finna útav. Um tú sendur 50.000.000 postar um dagin, og eini 4% keypa okkurt, verður vinningurin ovurstórur.

Enntá fyri nær um einki at gera til nyttu. Men tað situr ikki einans onkur hissini teldunørdur aftan fyri allan hendan postin. Talan er hinvegin um sera væl skipað brotsmannalið, ið virka um allan heimin. Tey eru so sanniliga í fremstu røð, tá tað snýr seg um nýmenning. Og við at svara uppá postin á ein ella annan hátt stuðlar tú hesum brotsmannaliðum. Lat tí vera.

Ein stór foring fyri arbeiðinum ímóti SPAM er USA. Meðan ES lóggáva sigur, at tú skalt hava givið loyvi til at fáa sendandi óumbiðnan post, so skalt tú í USA boða sendaranum frá, um tú ikki ynskir at móttaka meira post. Tað vil siga, at í Evropa skalt tú melda til, meðan í USA skalt tú melda frá. Og tíanverri hevur restin av heiminum hug at fylgja USA.

Tað ber til at gera sítt fyri at sleppa undan SPAM postum. Fyrst og fremst er umráðandi, at telduposturin ikki av sær sjálvum verður latin upp á telduni. Í Outlook DK verður hetta gjørt undir Vis>Layout. Nú ber til at stýra, hvør postur verður latin upp og ikki. Allur teldupostur, ið tú ikki kennist við, skal alt fyri eitt strikast. Um SPAM postur verður latin upp, er møguleiki fyri, at hesin hevur onkra slóð til teirra heimasíðu, har løgna navnið á slóðini merkir tín teldupost bústaður, og sostætt ber teimum boð um, at tú ert til. Meira týdningarmikið er tað, at tú á ongan hátt svarar postinum. Hevur tú fyrst svarað, eisini um tú biðjur um at verða strikaður úr teirra telduskrá, vita Spammararnir at tú ert til, og flyta teg í eina serliga premium skrá.

Hetta førir við sær, at tú við tíðini fært fleiri og fleiri Spam postar. Sum ein eyka vernd er gott við einum verjugarði, á enskum firewall, og einum serligum forriti at steðga SPAM posti, á enskum antiSPAM. Tað finnast nógv góð forrit á alnótini, bæði ókeypis og til keyps. Ein verjugarður tryggjar tær, at spammarar ikki nýta tína teldu sum støð at senda SPAM frá. SPAM forritini steðga og/ella strika SPAM.

# Stættarfløkja

*Nú gorra tey alvorliga, tey, sum á rókum sita,*
*ikki minst tey, sum árliga svølgja hvørjum bita.*
*Sum geykaungin troðkar øll hini úr reiðri,*
*vilja hesir mentunarpávar, at bert teir skulu fáa meiri.*
*Nei, nú skal ikki ein og hvør av Pallebasa stætti*
*geva bøkur og fløgur út og ganga runt í hatti.*
*Nú skulu bara vit vælbjargaðu, vit akademisku, skúlaðu, argaðu,*
*øll tey professionellu, genialu og ikki hesi banalt, sentimentlu,*
*sleppa runt um trogið at dansa, vit eru jú so við, uttan vansa,*
*at ganga runt í akademisku háborgini og svansa.*
*Hvusssu kann nakar halda, at ein sjómaður, ein sovorin apa,*
*skal kunna skriva, syngja og skapa?*
*Og ein timburmaður, við hondum sum ein risi,*
*hvussu skuldi hann havt lisið?*
*Hvussu skuldi Palleba við sínum 7 ára skúla,*
*hvussu skuldi Pallina, den kúla,*
*hvussu skulu tey halda, at tey eru nakað?*
*Allar bøkur, fløgur og málningar, tey árliga út geva,*
*skuldi alt verið aftur í høvdið á teimum blakað!*
*Og sjálvt, um tey sjálv gjalda tann kassa,*
*sum vit professionellu eru sett at passa,*
*so meina vit akademisku, summi í hatti,*
*at í Føroyum er nokk við einum mentunarstætti.*

**Valdemar**